## Grikkar í trongstøðu

ES stúrir fyri teirri búskaparligu støðuni í Grikkalandi, og ES-nevndin hevur biðið griksku stjórnina taka fleiri stig, sum sambært nevndini eru alneyðug fyri at fáa búskapin aftur á rættkjøl. Tað hevur eisini skund, tí stjórnin skal leggja sínar ætlanir fram innan fjúrtan dagar, skrivar AFP. Í fjør var hallið hjá tí almenna so stórt, at tað svaraði til 12,7 prosent av grisku bruttotjóðarframleiðsluni og var sostatt langt oman fyri evstamarkið hjá ES, sum er trý prosent. Grikkaland hevur biðið Altjóða Gjaldoyragrunnin IMF um hjálp til at sleppa burtur úr kreppuni.



## Palin sjónvarpsvertur

Sarah Palin gjørdist eitt kent andlit í USA og aðrastaðni, tá hon stillaði upp sum varaforsetaevni hjá John McCain á amerikanska forsetavalinum í 2008. Síðani hevur hon ikki verið so nógv frammi, men nú fáa amerikanararnir hana aftur á sjónvarpsskiggjan. New York Times skrivar, at Sarah Palin hevur skrivað undir sáttmála við ta høgrasinnaðu sjónvarpsrásina Fox News, har hon fær sína egnu . sending. Tað hevur annars ljóðað, at Sarah Palin hevur umhugsað at royna seg sum forsetavalevni í 2012.

# Politiska viðgerðin manglar



Helena Dam á Neystabø dugir í løtuni ikki at siga, nær mvg-frítøkan av ítrótta- og mentanarbygging fer at virka

**- Politiskt vórðu samgonguflokkarnir samdir um at broyta beinleiðis stuðulin til eina frítøku av mvg av ítróttaligari og mentanarligari bygging, men politiska viðgerðin av málinum manglar framvegis, sigur Helena Dam á Neystabø, mentamálaráðharri**

VAKSTRARTILTAK
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Í sambandi við fíggjarlógarviðgerðina fyri 2010 var semja millum samgonguflokkarnar, at dentur eigur at verða lagdur á at betra um umstøðurnar hjá ítróttini og hjá mentanini.

- Hetta verður partvís eisini gjørt út frá tí, at vit væntandi og vónandi aftur fara at skipa fyri Oyggjaleikunum innan ikki alt ov langa tíð, sigur Helena Dam á Neystabø, landsstýriskvinna í ítrótta- og mentamálum.

Upprunaliga ætlaði landsstýriskvinnan at seta av 10 milliónir krónur til endamálið sum beinleiðis stuðul til ítróttaligar og mentanarligar verkætlanir, men samgonguflokkarnir broyttu hetta til heldur at endurgjalda mvg'ið av slíkari bygging.

- Hetta merkir so tað, at lógarkarmurin í mvg-lógini má tillagast, og meðan fíggjarmálaráðið umsitur lógina eru tað jú vit her í mentamálaráðnum, sum skulu seta okkara fingramerki á tillagingina, sigur Helena Dam á Neystabø.

Hon viðgongur, at hóast hetta er ein frálík loysn, so merkir hon, at tað tekur longri tíð at seta stuðulsskipanina í verk.

- Tað manglar eisini tann politiska viðgerðin, sum skal staðfesta, júst hvørja bygging lógin skal umfata. Tað hevur verið vanlig fatan í mentamálaráðnum, at stuðulin bert skal umfata ítróttalig og mentanarlig verkløg, og tað umfatar so ikki til dømis kirkjur og samkomuhús. Men tað er so millum annað tað, ið politiska viðgerðin skal gera av, sigur Helena Dam á Neystabø.

Av tí at politiska viðgerðin enn vantar, og av tí at lógarkarmurin í mvg-lógini ikki er tillagaður enn, ber heldur ikki til at siga nágreiniliga, nær nýggja stuðulsskipanin fer at virka.

# Veruligt vakstrarfremjandi tiltak

**- At 10 milliónir krónur vórðu broyttar til mvg-frítøku av ítróttarligari og mentanarligari bygging, er einasta veruliga vakstrartiltak á allari fíggjarlógini, heldur Rodmundur Nielsen, sum hevur verið við í fíggjarlógarviðgerðini**

VAKSTRARTILTAK
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Upprunaliga ætlaði landsstýriskvinnan í mentamálum at seta 10 milliónir krónur av til stuðul til ítrótta- og mentanartiltøk, men hetta varð undir viðgerðini av fíggjarlógini broytt til, at bygging í sambandi við ítrótt og mentan skuldi frítakast fyri mvg.

- Hetta merkir so, at mvg-lógin skal tillagast, so hetta verður møguligt, sigur Rodmundur Nielsen, sum hevur verið við í viðgerðini av fíggjarlógini fyri í ár.

Hann metir, at hetta er eitt ómetaliga stórt framstig fyri bæði ítróttina og mentanina.

- Tað eru fleiri dømi um ítróttafeløg, ið bíða eftir svari upp á umsókn um stuðul til bygging av hølum til ítróttalig endamál, og at fáa ein stuðul, ið svarar til 20% av byggikostnaðinum, er ein sera stór fíggjarlig hjálp til feløgini, sigur Rodmundur Nielsen.

Hann vísir eitt nú til byggingina av Neistahøllini, sum er farin í gongd, og úr hansara egna nærumhvørvi stendur Støkk fyri at skula byggja eina nýggja høll.

- Eg eri sjálvur blandaður upp í eina ætlan um at byggja eitt nýtt skótahús, og har hevur ein umsókn ligið inni í mentamálaráðnum í trý ár, meðan vit framvegis bíða eftir einum svari. Við hesi nýggju tillagingini í mvg-lógini vita øll, hvar tey standa við atliti til bygging til ítróttalig og mentanarlig endamál, sigur Rodmundur Nielsen.

### Skapar virksemi

Hann heldur, at hetta er ein ætlan, ið veruliga kann skumpa undir virksemið í byggivinnuni.

- Eg havi varðhugan av, at tað eru fleiri ítróttafeløg, sum liggja og bíða eftir eini slíkari útmelding frá tí almenna. Tað verið seg fimleikafeløg, hondbóltsfeløg og kapproðrafeløg, sigur Rodmundur Nielsen.



Rodmurnur Nielsen fegnast um nýggju stuðulsskipanina, ið frítekur mvg av ótrótta- og mentanarbygging

Og tað heldur hann má vera »søtur musikkur« í oyrunum hjá byggivinnuni, sum annars ikki hevur alt ov nógv at tríva í nú um stundir.

- Hetta er ein avgerð, sum fer at hava ávirkan á virksemið kring alt landið, og eisini nakað, ið átti at vakt áhugan hjá ÍSF, heldur Rodmundur Nielsen.

Spurningurin, sum stendur eftir er so, hvussu fíggjarmálaráðharrin tillagar mvg-lógina, og júst hvørjar byggingar hesin stuðulin umfatar.

- Tað verður so ein tulkingarspurningur hjá mentamálaráðharranum, um eitt nú kirkjur og samkomuhús koma undir somu stuðulsskipan, sigur Rodmundur Nielsen.